VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur, partvís kavi. Hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið hósdagin:
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi, seinnmapartin upp í storm av suðri. Stundum regn, Hitin millum 4 og 7 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og stundum regn ella sirm. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur, sunnudagin lot til andøvsgul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

Føroysk Trælist í Ribarhúsi

Í dag lat Ole Jakob Nielsen, Føroysk Trælist, upp framsýning við listahandverki í Ribarhúsi í Fuglafirði

FRAMSÝNING

Hetta er framsýning av dreyaðum lutum, nógv ymisk íløt og tær eyðkendu ertunnu lampurnar, har ljósið ger viðin so livandi.

Allir lutirnir eru gjørdir úr føroyskum viði.

Ole Jakob Nielsen hevur síðani fyrst í 90'unum gjørt tað til sítt høvuðsmál bert at arbeiða við viði frá trøum, sum eru vaksin í Føroyum. Av serligu vindviðurskiftunum og tí vit ikki hava kaldar vetrar, vaksa trø ørvísi í Føroyum og gera tí viðin áhugaverdan at arbeiða í. Ole Jakob sigur, at avbjóðingin er at finna tað, sum liggur í hvørjum træ. Viðurin er ikki lýtaleysur og tað er áhugavert at gera lutir, sum fáa ein skeivleika í einum viðarkubba til at verða ein fyrimun. Ein stórur ójavnur kvistur kann verða til eitt satt listarverk í sær sjálvum, tá hann verður undir ein millimetur tunnur og ljós verður sett gjøgnum hann.

Ole Jakob hevur fingið fleiri áheitanir um at sýna fram í Ribarhúsið, men at enda bar so til. Framsýningarhølið har er sera væl egna til at sýna fram trælutirnar. Ribarhús í sær sjálvum er eitt stað, um aðrir býir í landinum kunnu øvunda fuglfirðingum. Heimavirkishandilin við øllum sínum sjálvbodnu eldsálum ger húsið livandi og drívandi.

Framsýningin er opin frá 27. januar til 5. mars, tá húsið er opið.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-13
Nuuk	-7
Qaqortoq	-5
Ammassalik	-9
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-2
Seyðisfjørður	-2
Tórshavn	0
Lerwick	3
Aberdeen	5
London	9
Tromsø	--
Bergen	5
Oslo	--
Stokkhólm	5
Keypmannah.	4
Helsinki	3
Moskva	-1
Berlin	0
Warzawa	0
Kiev	0
Bukarest	-2
Paris	5
Madrid	0
Róm	10
Malorca	14
Athen	14
Malta	15
Tunis	14
Beijing	0
New Dehli	19
Bangkok	25
Jakarta	27
Sydney	--
New York	4
Miami	26
Los Angeles	24
Meksikobýur	--
Panama	30
La Paz	7
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	28

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 962 hPa. vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og grynnist.



Í dag:
Eitt lágtrýst tekur seg upp vestan fyri Hebridurnar og verður vestan fyri Føroyar mikudagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 24/01 kl. 06^{00} – 25/01 06^{00}. Hitin í gjár: 5,5°
Minsti hiti máldur í januar: -8,8° - Mesti hiti máldur í januar: 11,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: 6,0 mm – mált frá 24/01 kl. 06^{00} – 25/01 06^{00}.
Avfallið higartil í januar: 184 mm

Alt um harmonikur

www.simme.eu

VESTFALLSKYRRINDI

23. januar Mánin longst frá jørðini
26. januar Tendring
2. februar Fyrra kvarter
7. februar Mánin næstur jørðini

Kelda: Ámanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
27 .jan	7:26	19:45	6:26	18:45	6:41	19:00	9:26	21:45	10:26	22:45	5:41	18:00	4:41	17:00	7:41	20:00	8:41	21:00	7:11	19:30	8:26	20:45
28 .jan	8:03	20:22	7:03	19:22	7:18	19:37	10:03	22:22	11:03	23:22	6:18	18:37	5:18	17:37	8:18	20:37	9:18	21:37	7:48	20:07	9:03	21:22
29 .jan	8:40	20:58	7:40	19:58	7:55	20:13	10:40	22:58	11:40	23:58	6:55	19:13	5:55	18:13	8:55	21:13	9:55	22:13	8:25	20:43	9:40	21:58
30 .jan	9:16	21:35	8:16	20:35	8:31	20:50	11:16	23:35	-	12:16	7:31	19:50	6:31	18:50	9:31	21:50	10:31	22:50	9:01	21:20	10:16	22:35
31 .jan	9:54	22:13	8:54	21:13	9:09	21:28	11:54	-	0:35	12:54	8:09	20:28	7:09	19:28	10:09	22:28	11:09	23:28	9:39	21:58	10:54	23:13